Fiskiskipaflotin:

# Semja ella sáttmálaloysi á midnátt í gjár

**Sáttmálin millum Føroya Reiðarafelag øðrumegin og Føroya Skipara-og Navigatørfelag hinumegin gekk út, 1. desember í fjør, men so seint sum fyri klokkan 15 í gjár, var ikki greitt, um partarnir fóru at semjast um nýggjan sáttmála ella ikki. Tveir skipabólkar hava gjørt nýggjan sáttmála við FSN, men fyri klokkan 15 í gjár vóru framvegis seks sáttmálar eftir at fáa undir land**

FISKISKIPAFLOTIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Nýggjur sáttmáli er undirskrivaður millum Felagið Línuskip og Føroya Skipara-og Navigatørfelag, men fyri klokkan 15 í gjár var eingin nýggjur sáttmáli gjørdur fyri eitt nú partrolararnar og felagið hjá skiparum og navigatørum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Klokkan 15 í gjár skuldu Føroya Skipara-og Navigatørfelag og teir seks skipabólkarnir, sum eru limir í Føroya Reiðarafelag og enn ikki hava fingið í lag nýggjan sáttmála við FSN, taka støðu til eitt nýtt semingsuppskot, sum semingsstovnurin hevur lagt fyri partarnar. Samdust feløgini ikki, var sáttmálaloysið millum partarnar frá á midnátt í gjár at rokna, og vandi er fyri, at tann parturin av flotanum, sum ongan sáttmála hevur, verður lagdur.

Fiskiskipabólkarnir, sum eru limir í Føroya Reiðarafelag, eru átta í tali. Tveir teirra, Felagið Línuskip og Felagið Ídnaðarskip, sum bert eru nøkur heilt fá skip, hava gjørt sáttmála við Føroya Skipara-og Navigatørfelag.

Teir skipabólkar, sum skuldu taka støðu til semingsuppskotið í gjár, eru verksmiðjutrolarar, partrolarar, lemmatrolarar, rækjuskip, kraftblokkaskip og garnaskip. Hinumegin borðið er so Føroya Skipara-og Navigatørfelag, sum er manningarfelagið í sáttmálatrætuni.

## Undan "hattinum"

Upprunaligi sáttmálin millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Skipara-og Navigatørfelag, fór úr gildi 1. desember 2004, men hevur verið longdur síðan.

Meðan teir átta fiskiskipabólkarnir, sum eru limir í Føroya Reiðarafelag, samráddust undir "hattinum" hjá sínum felag, eydnaðist ikki at fáa í lag semju. Fyrsta semingsuppskotið, sum semingsstovnurin legði fyri partarnar fyrr í ár, varð vrakað av báðum pørtum – og tað varð tað seinna uppskotið eisini.

Sama dag, sum seinna semingsuppskotið varð vrakað, og øll útlit vóru til verkfall, samdust Føroya Reiðarafelag og Føroya Skipara-og Navigatørfelag kortini um, at hvør skipabólkur sær – tilsamans átta í tali - skuldi samráðast við FSN. Hetta góðtók semingsstovnurin, og ein semja varð orðað, sum forðaði fyri, at vit tá fingu verkfall.

Men nú "brennur" tampurin aftur, og klokkan 15 í gjár skuldu so tey seks feløgini øðrumegin og Føroya Skipara-og Navigatørfelag hinumegin koma við sínum svari upp á semingsuppskotið.

Áðrenn Sosialurin fór til prentingar stutt eftir middagsleitið í gjár, var ógjørligt at siga, hvat úrslit feløgini fóru at koma til í sáttmálatrætuni.

---

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag:

# - Dugi ikki at meta um úrslitið

**Samráðingarnar millum Føroya Skipara-og Navigatørfelag øðrumegin og limafeløgini hjá Føroya Reiðarafelag hinumegin hava verið rættiliga drúgvar og truplar**

FISKISKIPAFLOTIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein, segði seg fyrrapartin í gjár ikki duga at meta um, hvat fór at spyrjast burtur úr semingsroyndini millum tey seks limafeløgini í reiðarafelagum øðrumegin og Føroya Skipara-og Navigatørfelag hinumegin.

Men hvat hendir so á midnátt í kvøld, um semingsuppskotið, sum verður lagt fyri partarnar í dag klokkan 15, verður vrakað - av øðrum ella báðum pørtum, og semingsstovnurin gevst við sínum royndum at finna semju?

- Ja, tað veit eg ikki; tá hava vit so sáttmálaloysi milum hesar skipabólkar og FSN, og vandi er fyri, at tann parturin av flotanum, sum tá liggur í sáttmálaloysi, verður lagdur, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag.

## Eingin dýrari

Jákup Sólstein ásannar, at hesar samráðingarnar hava verið ógvuliga drúgvar og truplar.

- Vit hava sagt, at eingin sáttmáli skal gerast dýrari fyri reiðaríini – og at talan í minsta lagi skal verða um null-loysnir.

Hann vísir á, at teir báðir sáttmálarnir, sum eru gjørdir – sáttmálin hjá línuskipum og ídnaðarskipum – snúgva seg um null-loysnir, har skiparar og navigatørar hava slakað eitt lítið sindur í hýrum afturfyri eina hækking í pensjónini. Hesir sáttmálar eru at kalla teir somu, sum semingsstovnurin legði upp til fyrr í ár, men sum Føroya Reiðarafelag og Føroya Skipara-og Navigatørfelag tá vrakaðu.

Jákup Sólstein væntar ikki, at tað fer at verða so trupult hjá Felagnum Rækjuskip at fáa í lag nýggjan sáttmála við FSN, tí eisini her tykjast partarnir rímiliga samdir um eina null-loysn.

- Men, sum heild, dugi eg ikki at meta um, hvat úrslitið í dag verður, segði formaðurin í Føroya Reiðarafelag fyrrapartin í gjár.

## Flotin lagdur

Terji Sigurðsson, sum saman við Jóannesi Djurhuus, manna semingsstovnin, sigur, at samráðingarnar millum feløgini hava verið truplar.

Hann ásannar, at verður uppskotið, sum nú liggur á borðinum, vrakað, hava partarnir ongan sáttmála, og tá er vandi fyri, at tann parturin av flotanum, sum ongan sáttmála hevur, verður lagdur.



*Samdust Føroya Skipara-og Navigatørfelag og tey seks limafeløgini í Føroya Reiðarafelag ikki um nýggjar sáttmálar seinnapartin í gjár, er væntandi, at stórur partur av fiskiskipaflotanum verður lagdur – og at vit komandi dagarnar fara at síggja nógvar tómar fiskakassar og nógvar tómar plattar*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*